Álit

í

løgtingsmáli nr. 66/2022: Uppskot til løgtingslóg um fyrsta byggistig at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum

Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóni Nolsøe Joensen, hevur lagt málið fram 7. mars 2023, og eftir 1. viðgerð 22. mars 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 13. og 27. apríl, 2., 4., 9. og 12. mai og 12. juni 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Fróðskaparsetur Føroya, landsstýrismannin í fíggjarmálum, Ruth Vang, og í tveimum umførum landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen, saman við Landsverki.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Bjarni Hammer, Eirikur í Jákupsstovu og Hanna Jensen) hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at heimila landstýrismanninum at skipa fyri, at partar av skúlabygningunum á Frælsinum í Tórshavn (fyrrverandi Læraraskúlin og Venjingarskúlin/Skúlin á Fløtum) verða høvuðsumvældir og umbygdir og verða at nýta sum partur av seturskampus hjá Fróðskaparsetri Føroya. Hetta er eitt framhald og ein íverksetan av setursætlanini hjá undanfarnu samgongu, har treytað avtala varð gjørd um avhendan og útvegan av ognum millum land og Tórshavnar kommunu viðvíkjandi bygningunum í Hoydølum og á Frælsinum.

Í uppskotinum verður upplýst, at Landsverk hevur fyrireikað eitt uppskot til íløguætlan, har mælt verður til, at ognirnar á Frælsinum verða høvuðsumvældar og umbygdar í fleiri stigum í tíðarskeiðnum 2022-2029. Hóast verkætlanin ikki er liðugt prosjekterað til at verða boðin út, hevur Landsverk gjørt eina varliga meting av verkætlanarkostnaðinum, ið er mettur til umleið 144 mió. kr. í hesum tíðarskeiði.

Fyriliggjandi uppskot snýr seg um at fremja fyrsta byggistig í verkætlanini, tað er at høvuðsumvæla lon 5 og at fyrireika høvuðsumvæling av lon 1, ið ætlandi verður gjørt í heyst. Samlaði kostnaðurin er í vár mettur til 24 mió. kr.

Landsverk hevur mælt til, at ráðgeving og arbeiðstøkur verða framdar í fakum, soleiðis at til ber at hava neyva stýring við umvælingarætlanini. Hetta lógaruppskotið varð tískil lagt fyri Løgtingið, hóast verkætlanin ikki var liðugt prosjekterað til at verða boðin út, so sum vanligt er við verkætlanum um nýgerð av bygningum.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt hesi viðurskifti við landsstýrismenninar í barna- og útbúgvingarmálum og fíggjarmálum og Landsverk. Nevndin hevur verið serliga ivasom um avgerðina at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið um eina byggiverkætlan, sum ikki er liðugt prosjekterað og har ætlaða arbeiðið, ið skal fremjast innan ein útreiðslukarm á 24 mió. kr., ikki er boðið út.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum svarar skrivligum spurningi frá nevndini hesum viðvíkjandi, at meginreglan seinastu árini hevur verið, at verklagslógir ikki verða lagdar fyri Løgtingið, fyrr enn prosjektering og útboð hava verið. Talan er tó í hesum føri um eina serliga verkætlan í fleiri stigum, har ynski er um at læra av tilgongdini, áðrenn seinni verkætlanarstig verða framd og boðin út, tí talan er um stórumvæling og ikki nýbygging. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur tí tikið undir við, at henda verklagslóg til fyrsta verkætlanarstig verður løgd fram, áðrenn verkætlanin er boðin út.

Nevndin hevur eisini viðgjørt hesi viðurskifti við landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum og Landsverk, og tann 6. juni 2023 fingið statusuppgerð yvir gongdina í verkætlanini.

Viðvíkjandi útboði av fakarbeiðstøkum á lon 5 er støðan hendan:

- Tekja er bjóðað út 23. mai 2023 við tilboðsfreist og lisitasjón 13. juni 2023 kl. 14.00,
- Fyribils p-øki til 135 bilar á pørtum av fløtuni á Frælsinum er bjóðað út 1. juni 2023 og lisitasjón verður 22. juni kl. 15.00,
- Prosjektering av útveggjum er í gongd og verður boðin út, soleiðis at arbeiðið kann fara í gongd, um somu leið, sum tekjan verður liðug og
- Restin av umvælingararbeiðinum (EL, HVS, gólv, loft, máling, v.m.) verður bjóðað út eftir hetta og er ikki í sama mun tongt at veðurlagi.

Fyri allan bygningin á Frælsinum 20 verður arbeitt fram ímóti at gera eina yvirskipaða heildarætlan í heyst. Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Tórshavnar kommuna hava avtalað, at ein hædd av teimum trimum, sum Fróðskaparsetrið leigar í Sjóvinnuhúsinum, skal vera tøk hjá Tórshavnar kommunu í august 2024 og hinar báðar seinni eftir nærri avtalu. Partarnir hava skrivað undir skeyti viðvíkjandi avhendan av pørtum av bygninginum á Frælsinum til landsstýrið.

Fyri at tekjan og útveggir á lon 5 kunnu verða gjørd í summarhálvuni er umráðandi, at gongd kemur á hetta arbeiðið sum skjótast. Tekjan og fyribils parkeringsøki eru boðin út, men Landsverk hevur ikki fingið tilboðini inn enn, tí ov stutt er fráliðið. Útveggir verða bodnir út í næstum.

Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum hevur mælt nevndini til, at løgtingslógaruppskotið verður tillagað, soleiðis at tað bert fevnir um tær tríggjar arbeiðstøkurnar tekja, útveggir og parkeringsøki. Tørvur verður sostatt ikki á at hækka útreiðslukarmin í lógini, sum landsstýrismaðurin annars undan hesum í skrivligari áheitan til nevndina hevði biðið um. Tá restin av umvælingararbeiðinum á lon 5 hevur verið í útboði og útboðsvinnari er funnin, leggur landsstýrismaðurin eftir ætlan eitt uppskot um broyting av løgtingslógini fyri Løgtingið, har biðið verður um, at løgtingslógin skal fevna um høvuðsumvæling av allari lon 5.

Meirilutin tekur undir við at tillaga lógina, soleiðis at hon fevnir um tær tvær arbeiðstøkurnar, ið eru bodnar út og útveggirnir, ið verða bodnir út í næstum, so at arbeiðið kann fara í gongd í summarhálvuni; umframt prosjektering og ráðgeving. Í hesum sambandi setur meirilutin fram eitt

broytingaruppskot, sum tekur partin um innbúgv úr verklagslógini. Meirilutin heldur tað hava stóran týdning, at arbeiðið at útvega Fróðskaparsetrinum nøktandi hølisumstøður kann byrja.

Meirilutin leggur dent á, at arbeiðið ikki skal verða sett í gongd, um landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum og Landsverk meta tilboðini fyri hesar arbeiðstøkurnar at vera hægri, enn tey høvdu verið, um arbeiðið ikki hevði skund at verða framt.

Tað er av alstórum týdningi, at tamarhald er á kostnaðinum, og tí hevur meirilutin ynskt, at arbeiðini verða boðin út. Tí tekur meirilutin undir við ætlaða leistinum, at tá restin av umvælingararbeiðinum á lon 5 hevur verið í útboði og vinnari er funnin, leggur landsstýrismaðurin fram uppskot til broyting í løgtingslógini, ið tá skal fevna um høvuðsumvæling av allari lon 5.

Meirilutin setir fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1 verður "prosjektering, ráðgeving og innbúgv" broytt til: "prosjektering og ráðgeving".

Viðmerking til broytingaruppskot:
Við hesi broyting verður innbúgv tikið úr lógarásetingini.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Undanfarna samgonga tók eitt týðandi fet á leiðini, tá ið táverandi Uttanríkis- og mentamálaráð og Tórshavnar kommuna fóru undir at gera býtishandil um venjingarskúlan á Frælsinum og studentaskúlan á Hoydølum. Kósin bleiv tá sett, og verulig ferð kundi setast á verkætlanina um at gera eitt kampusøki. Tað skal tí ongin ivi vera um, at minnilutin tekur fult undir við, at Fróðskaparsetrið fær eitt kampus.

Tá ið hetta er sagt, so heldur minnilutin tað vera sera umráðandi, at verkætlanir verða væl fyrireikaðar. Í hesum liggur m.a., at heimildin er púra greitt allýst, so at vit vita, hvat pengarnir fara til, og at kostnaðarmetingin er so góð sum møguligt. Helst skulu útboð og tilboð vera avgreidd, áðrenn tað verður komið í Løgtingið við uppskoti til verklagslóg. Tað hava verið ringar royndir av teimum verklagslógum, sum hava verið ov leysar í tí.

Í hesum ítøkiliga uppskotinum legði landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum upprunaliga upp til at umvæla lon 5 og at fyrireika umvæling av lon 1. Ímeðan málið hevur ligið í Fíggjarnevndini, er komin ein umbøn frá landssstýrismanninum um at fáa eitt fyribils parkeringsøki við í verklagslógina, og samstundis verður ein nýggj prísmeting gjørd av lon 5. Biðið varð um at hækka upphæddina í verklagslógini við 9,3 mió. kr., soleiðis at upphæddin fór frá 24 mió. kr. til 33,3 mió. kr.

Tað er á ongan hátt tryggjandi, at týðandi broytingar verða gjørdar í verklagslógini, ímeðan málið liggur í nevnd. Hetta gevur eisini ábendingar um, at verklagslógin ikki var nóg væl fyrireikað, áðrenn hon kom í Fíggjarnevndina.

Eftir at Fíggjarnevndin vísti á viðurskiftini omanfyri, eru enn fleiri tillagingar komnar frá landsstýrismanninum og Landsverki, fyri at royna at ganga kritikkinum frá nevndini á møti.

Tað stutta av tí langa er, at nú verður heimildin í verklagslógini skorin inn til at snúgva seg um trý ting: tak, útveggir og fyribils parkeringsøki. Tó verður kostnaðarmetingin á 24 mió. kr. varðveitt til eitt væl minni verklag enn tað, sum upprunaliga skuldi dekka alla lon 5. Hetta undrar minnilutan stórliga.

Samanumtikið kennir minnilutin seg framvegis ikki tryggan við at samtykkja verklagslógina, sum hon fyriliggur. Hon átti at verið løgd betur til rættis.

Tað má tó enn einaferð undirstrikast, at minnilutin tekur fult undir við, at eitt kampus øki verður gjørt fyri at framtíðartryggja Fróðskaparsetur Føroya og at økja um trivnaðin hjá lesandi í Føroyum.

Minnilutin vil tí, at landsstýrismaðurin leggur málið fram aftur eftir summarferiuna, tá alt er liðugt fyrireikað og boðið út.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 12. juni 2023

Eyðgunn Samuelsen formaður	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	